52-070/2024

LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postrúm 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 15. januar 2025
J. nr.: 25/00767-3

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-070/2024 eftir § 52 a í tingskipanini um lógarheimild til at selja kommunal grundstykkir fyri marknaðarprís, frá Hervør Pálsdóttir, løgtingskvinnu

Spurningurin var soljóðandi:

1. Er landsstýrismaðurin sinnaður at veita kommunum lógarheimild til at selja kommunal grundstykkir fyri marknaðarprís, hóast hann er lægri enn ein møguligur kostprísur?

Svar:

Útgangsstøðið sambært kommunufulltrúini er, at kommunal grundstykkir skulu seljast fyri marknaðarprís, og at sølan skal vera fíggjarlig ráðilig hjá kommununi. Hervið verður tryggjað, at kommunur ikki lata einstaklingum fíggjarligan stuðul. Fíggjarligur stuðul og frammíhjárættindi annars til einstaklingar ella einstøk vinnuvirkir krevur heimild í lóg.

Kravið um marknaðarprís hevur við sær, at tað ikki er nóg mikið, at kommunur selja grundstykkir fyri ein prís, sum samsvarar útreiðslunum hjá kommununi fyri keyp av jørð og byggibúgving av grundstykkjum, sokallaður kostprísur, um marknaðarprísurin er hægri enn kostprísurin.

Hinvegin hevur kravið um marknaðarprís eisini við sær, at um marknaðarprísurin er lágur, kann kommunan selja til hendan prísin, hóast søluprísurin ikki javnvigar kostprísinum. Hetta er tó bara galdandi, um tað er fíggjarligt ráðiligt hjá kommununi at selja grundstykkini í staðin fyri at bíða eftir betri tíðum og harvið hægri grundstykkjaprísum. Treytin um, at kommunustýrið skal bera seg fíggjarliga ráðiligt at við skattgjaldarans peningi, merkir, at tað vanliga ikki er fíggjarligt ráðiligt at gera jørð byggibúnað til grundstykkir, um tað ikki kann væntast, at grundstykkini verða seld fyri ein prís, sum í minsta lagi javnvigar kommunalu útreiðslunum.

Sambært § 44, stk. 1 í kommunustýrislógini er meginreglan, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast, uttan so at ognin hevur verið boðin út alment frammanundan.

Hendan meginregla verður endurtikin í § 1 í kunngerð nr. 122 frá 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn. Í § 2 í kunngerðini eru undantøk frá hesi meginreglu. Í § 2, stk. 1, nr. 4 í kunngerðini er ásett, at fastogn hjá kommununi tó ikki nýtist at verða boðin alment út, um talan er um kommunala útstykking o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan ásettum reglum. Hendan áseting víkur tó ikki frá meginregluni um, at kommunal fastogn, m.a. grundstykkir, í útgangsstøðinum skal seljast til marknaðarprís.

Kommunur hava greitt frá, at tær hava avbjóðingar við at sleppa av við grundstykkir, um marknaðarprísurin í minsta lagi er kostprísurin.

Um galdandi reglur hava við sær, at kommunurnar annaðhvørt ikki hava áhuga í at útstykkja meira ella ikki sleppa av við tey grundstykkini, tær hava, so er hetta ein álvarslig avbjóðing, tá tað snýr seg um møguleikan at útvega fleiri møguleikar at seta føtur undir egi borð.

Eg fari tí at taka hetta málið upp við kommunurnar í næstum. Samskiftið millum landsstýrið og kommunurnar fer at vísa, hvørja loysn vit koma fram til viðvíkjandi útstykkingum og sølu av grundstykkjum, og um tað ber til at broyta reglurnar soleiðis, at kommunurnar lógliga kunnu selja grundstykkir fyri marknaðarprís, sum liggur undir kostprís, og hvørjar treytir møguliga skulu fylgja við eini slíkari sølu.

Løgmálaráðið 15. januar 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður